# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein skeiv avgerð

**- ikki at loyva framløgu av máláliti**

Avgerð løgmans um at nokta landsstýrismanninum í mentamálum at taka ímóti áliti um málstevnu er bæði skeiv og óskiljandi. Grundgevingin er, at landsstýrismenn skulu ikki sleppa at profilera seg politiskt eftir, at val varð útskrivað. Hetta er í sjálvum sær rættiliga óskiljandi, tí hvør skal gera av, nær eitt mál er politiskt profilerandi? Annað er so tað, at ein fyrbilsstjórn ikki eigur at taka politiskar avgerðir eftir, at val er útskrivað. Hetta er nakað heilt annað og kann als ikki samanberast við eina serfrøðingafrágreiðing.

Avgerð løgmans er eisini ivasom eftirsum, at partamaður hansara, landsstýrismaðurin í heilsumálum, hevur tikið ímóti áliti um sjúklinganøgdsemi, eftir at val var útskrivað. Hetta er nakað heilt annað, sigur løgmaður, tí her er talan um eina fakliga nevnd – enntá eina danska fakliga serfrøðinganevnd! Hvat er málstevnunevndin annað enn júst ein faklig serfrøðinganevnd? Her sita okkara bestu málfrøðingar og hava gjørt sær stóran ómak við at fáa álitið liðugt til tíðina – nakað sum er mestsum eindømi í slíkum førum, og so sleppa tey ikki av við verkið. Hartil er talan um føroyingar, og tað er opinberliga nakað annað og meira politiskt vandamikið! Álvaratos, her hongur ikki saman hjá løgmanni! Her haltar logikkur løgmans av álvara, og ein má spyrja, hvat hetta er fyri nakað?

Allir føroyingar eru góðir við móðurmálið. Øll hava bíðað við størsta spenningi eftir frágreiðing og tilmælum frá hesi serfrøðinganevndini, sum eitt samt løgting hevur tikið avgerð um. Hava hesir mongu, sum hava bíðað, veruliga uppiborið at skula bíða til val er av og nýtt landsstýri einaferð er skipað? Nei, als ikki og hartil kemur, at almenningurin hevur krav uppá at vita, hvat flokkarnir í valstríðnum halda um tilmælini hjá serfrøðingunum. Vit kunnu ikki annað enn undrast á avgerð løgmans og mæla honum til at broyta hana alt fyri eitt. Hvørt henda avgerð skyldast lítlum umhugsni ella sum ikki einaferð vánaligari ráðgeving er eitt feitt – hon gagnar ikki umdømi løgmans, og hon gagnar ikki føroyskum máli.

**Sosialurin**

## Politisk karrusell

**HERI MOHR**



Ein av teimum eldru oddafiskunum í føroyskum lands- og kommunalpolitikki, Jógvan við Keldu (F), hevur í bløðunum nú um dagarnar eitt lesarabræv, sum viðger ”almenna virksemi” og ”illoyalan formann í Norðoyatunnlinum”.

Kjarnin í tí heldur fløkjasligu greinini er tann, **at** greinskrivarin hevur analyserað fólk, ið hava undirskrivað eitt mótmæli viðvíkjandi Sandoyartunnlinum, **at** tey, ið liva í einum dunnuhyli, trúgva, at vit fáa eitt betri PISA-úrslit, skúlaverk og heilsuverk, um vit havna fasta sambandinum við Sandoynna, **at** spurningurin um at fáa meiri pening er ikki til, og tí má arbeiðið á undirvísingarøkinum og heilsuøkinum gerast produktivt og soleiðis fíggja tunnilsgerð, **at** væl útbúgvið fólk mugu gevast við at seta krøv til tað politiska/fíggjarliga systemið og í staðin fyri meta arbeiði sum eitt kall við fullari ábyrgd, **at** tey (væl skúlaðu) mugu halda uppat við lønarkrøvum, sum vit 50000 føroyingar ikki hava ráð til at honorera, **at** Bjarni E. Bjarnason framdi eina skarnsgerð við at undirskriva umrødda mótmæli, og **at** tað er løgið, um hann (BEB) av hesi orsøk sleppur undan at verða rikin úr starvi.

Í fysikktímunum lærdi lærarin okkum, hvussu tvey ella fleiri evni kunnu destillerast, skiljast sundur, við kóking. Um vit á líknandi hátt destillera greinina hjá nevnda løgtingsmanni, fáa vit fylgjandi ekstrakt:

*Meira produktivt arbeiði má gerast á undirvísingarøkinum og í heilsuverkinum fyri at útvega pening til tunnilsgerð.*

*Væl útbúgvið fólk skal gevast við at seta krøv mótvegist almennum myndugleikum, men heldur skulu tey kenna arbeiði sum kall við fullari ábyrgd. Tað er avmarkað, hvussu nógva løn føroyingar hava ráð til at gjalda hesum fólkum.*

*Tað er skarnsgerð at undirskriva mótmæli, og slíkt eigur at verða revsað.*

Lesarabrævið ber brá av at vera eitt politiskt manifest – Jógvan við Keldu verður um stutta tíð løgtingsmaður emeritus. Óvist hví 2363 ára gamli Herostratos rennur okkum í hug, men tankar ferðast so víða, har er einki landamark. Tað skal tó sigast, at hansara ”berømmilsi” gjørdist ikki ódoyggiligt orsakað av lesarabrøvum.

Og kortini eru teir báðir ikki heilt ólíkir. Uttan tó at gera sammeting skerst ikki burtur, at ein av hugaheimsins negativu drívkraftum í ævinliga gonguverkinum, *perpetuum mobile*, er fáfongd og egosentrisma.

## Droppa Tobba

**SV. AAGE ELLEFSEN**



Nú má Tjóðveldi fáa staðfest, hvønn politikk flokkurin hevur á samferðsluøkinum.

Tað er villeiðandi at lata Páll á Reynatúgvu agitera fyri einum tunnli til Sandoyar og at lata tey fýra vágavalevnini hjá tjóðveldinum agitera fyri útbyggingum av floghavnini í Vágum, samstundis sum framsøgumaður floksins sigur flokkin ganga inn fyri at droppa hesar báðar íløgurnar!

Úrslitið av hesum Tobbaútsøgnunum fyriliggur! Tað er júst dagsins støða í flogvallarmálinum - atgerðarloysi, stagnatión og afturútsigling!

Spurningurin frameftir er, hvørt vit framhaldandi skulu lata Tobba og aðrar eysturoyingar á einari síðu mótvegis Poul Michelsen og hansara harkaliðið á hinari spilla okkum tíðina við trætimálinum um, hvar ein nýggjur framtíðarflogvøllur skal leggjast, ella vit beinanvegin skulu fáa maximerað regularitetin í Vágunum og longt breytina hesar umtalaðu 450 metrarnar, soleiðis sum semja er fingin um.

Framsøgumaðurin hjá Tjóðveldi heldur okkum hava ráð at bíða, til hann og Poul Michelsen gerast samdir, hóast semja teirra millum ikki er møgulig.

Tí má Tjóðveldi nú taka støðu, hvørt teir taka undir við framsøgumanninum ella teir vilja vera skilagóðir og droppa Tobba!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.